# Altjóða havfiski-kapping í Føroyum



Føroyingar hava eina langa søgu við havfisking aftanfyri seg. Mangan var tað fiskurin, sum bjargaði okkara undangongumonnum. Við árunum hava føroyingar ment fiskiútgerðina og skipini. Summum dáma væl at siga, at føroyingar eru bestu fiskarar í heiminum. Nú fáa vit so møguleika at royna tað!

Fyrsta altjóða havfiskikappingin í Føroyum nakrantíð verður í Runavík í døgunum 22.-24. august í ár. Hendan fiskikapping gongur fyri seg við tráðu í báti. Væntast kann, at nógvir fiskarar úr øllum heiminum koma til Føroya at royna seg. Summir gera uttan iva nógv fiskingina.

Uttanlanda er tað ikki óvanligt, at menn eru stuttleikafiskarar burturav og liva av at vera við í kappingum. Vit kunnu kanska vænta okkum, at onkrir av hesum monnunum koma hendanvegin í August.

Meira fæst at vita á *www.smyril-line.com*




















